# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 verður samvera við drekkamunni. Kl. 12.00 verður sunnudagsskúli og samstundis verður møti við luttøku av Frank Brearly frá New Tribes Mission.
Sunnukvøldið kl. 21.00 verður bønar- og lovsongsløta fyri ung í aldrinum 13-19 ár.
www.hebron.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 20.00 verður møti á Eiði. Farið verður frá Frelsunarherinum kl. 17.30.
Sunnudagin kl. 11.00: Møti.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.30: Bøn.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti.
Mánadagin kl. 17.00: Smáskótamøti og kl. 19.00 stórir skótar.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus og lív hins kristna.
Kl. 11.00: Gudstænasta, J.V. Danielsen.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 verður JC Teens – spennandi ungdómsmøti har m.a. filmurin: »Lay it down« verður sýndur á stórskíggja. Ungdómur 11-18 ár er vælkomin.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli.
Fríðtór Debes talar um endatíðina við fokus á »Ísrael, tjóðirnar og samkoman«. Eisini verður kaffi. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Ebenezer**
Leygardagin frá kl. 14.00 til kl. 17.30 verður skeið í Ebenezer, har NTM greiðir frá arbeiðshættum, teir nýta fyri at stovna nýggjar samkomur. Øll eru vælkomin.
Sunnudagin kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 12.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Evangel. møti, Frank Brearly frá NTM talar.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Hans Eiler Hammer.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 18 Messa í Mariukirkjuni.
Fríggjadag k. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Biskup Lukas de Hovre í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 21. sept. kl. 14.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jakobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti v/ Símin Absalonsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30: Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jógvan Z. um evnið: »Kann eg hvíla í míni trúgv? Hvat við øðrum trúgvum?« og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 er evnið: »Regin og Heidi fara út á markina«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtunum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum bæði møtini.
Týskvøldið kl. 20.00 (í eini skúlastovu) verður undirvíst um Opinberingina við Jógvan Z.
www.livdin.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjakvøldið kl. 20 Alt-kann-henda.

**Mariasystir Josuana úr Noregi**
hevur um Gud vil hesi møti:
Fríggjadagin kl. 19.30
**Missiónshúsið á Tvøroyri.**
Týsdagin 23.9. kl. 19.30
**Missiónshúsið í Sørvági.**

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 22. september kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Jógvan Fríðriksson, presti. Evni: At blíva gamal.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
uppi á Brekku 3
Í kvøld kl. 20.00: After Eight.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00. Mánakvøldið kl. 20.30: Bønarmøti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ breyðbróting.
Mánadagin kl. 19.00: Andakt í eldrasambýlinum.
Telefonandaktin 424741.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Barnagudstænasta, kl. 19 Sangløta við tónleikarum úr Vestmanna o.a.

**Karmel, Eiði**
Møtiraðin heldur fram í kvøld kl. 20.00. Thomas Thomassen og aðrir tala. Jóhanna, Hallgerð og Marita syngja. Bønarløta verður kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30: Sunnudagsskúli, kl. 19.00: Møti við Mariusystur Josuanu, sum vísir myndir og greiðir frá arbeiðnum. Høvi verður at ogna sær onkra bók og samstundis stuðla arbeiðinum.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Pola Jacobsen.
Tim. 5 byrjar aftur mánadagin kl. 17.30. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús v/ Arna Abrahamsen o.fl.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Oddbjørg og Helga Abrahamsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 18.00: Møti, Torstein Johannesen, trúboðari, talar. Innsavnan til Heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Heimasíða: www.jesus.fo

**Missiónshúsið á Leirvík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 v/ Torleif Johannesen. Barnaansing verður. Ungdómsmøti kl. 21.00, Heidi Andreasen og Eyð Henze av Eiði luttaka.

**Missiónshúsið Thabor, Toftir**
Einki ungdómsmøti verður í kvøld. Ístaðin koyra bilar yvir til Strendur, har felagsungdómsmøti verður kl 20.00. Vit møtast við Thabor kl 19.15 og koyra heim aftur tá felagsungdómsmøti er liðugt. Øll eru hjartaliga vælkomin við!

**Getsemane**
*á Brekku 19, Klaksvík*
Fríggjakvøldið kl. 20 Hugnaløta fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Hanus Lassen, kl. 21 Ungdómsmøti.
Mánadagin KBBB samlast hjá Kristiannu Johannessen, Stangavegur 150.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17.00 Barnaarbeiði 1.-5. fl.
Týskvøldið kl. 19.00 møta tey ungu, 6. fl. og eldri.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Gunnar Reynslág, Argir, talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 verður møti við mariusystrini Josuanu. Savnað verður inn til Mariusystrarnar.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Árna og Asbjørg Kjærbeck. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Allir sjómanskvinnuringarnir í Suðuroynni**
samlast í missiónshúsinum í Hvalba leygardagin 27. sept. kl. 18.00. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Hvalbiar missiónshús**
Fríggjakvøldið 19. sept. kl. 20 Møti v/ Bergi D. Joensen. Ung luttaka. Drekkamuður.
Leygarkvøldið 20. sept. kl. 20 Møti v/ Bergi D. Joensen. Robert Thomsen syngur. Innsavnan til Heimamissiónina. Drekkamuður.

**Missiónshúsið í Sumba**
Fundur verður leygarkvøldið kl. 20 við Ruth Inge Gregersen, skrivara frá Danmission. Innsavnan verður til Danmission.

**Frelsunarherurin, Vági**
Leygarkvøldið kl. 20.00: Bøn- og lovsangsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Evangeliskt møti v/ fríum vitnisburði.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 14. september verður gongutúrur: Konufelli-Syðradal. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Miðal tungur túrur. Havið heit og góð gongukłæðir og matpakka við. Tilmelding.

## KONFIRMATIÓNIR

**Konfirmantar í Fuglafjarðar kirkju**
**21. september 2003**

Borgar Borðoy, Fuglafjørður
Jóhan Sólheim Ellingsgaard, Kambsdalur, Fuglafjørður
Petur Kristian Jacobsen, Fuglafjørður
Vincent Jacobsen, Fuglafjørður
Hilmar Ellingsgaard Petersen, Fuglafjørður
Pól Jakku Acala Samuelsen, Fuglafjørður
John Eliasen Quinn, Fuglafjørður
Anita Højgaard, Fuglafjørður
Margretha Egholm Jacobsen, Fuglafjørður
Sólvá Óladóttir Johannessen, Fuglafjørður
Marna Maria Dalsá Olsen, Fuglafjørður
Kristianna Olevina Petersen, Fuglafjørður
Sylvia Berthelsen Petersen, Fuglafjørður

## GULLBRÚDLEYP

Í dag hava Malan og Poul Eli Bærendsen, Tvøroyri, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

## BRÚDLEYP

Hósdagin 25. september giftast á Ráðhúsinum í Toulouse, Anita Elinda Ellendersen, úr Fámjin og Alex Nouwaga, úr Togo.
Adr.: c/o Mme Houndole
15, Rue Deu Colonel Toussaint Bat B 1,
31500 Toulouse
Frakland.




Bileftirlit Føroya
Faroes' Vehicle Inspection
Bileftirlit Føroya
Hoyvíksvegur 57
FO-110 Tórshavn
tel 350400
fax: 350401
e-mail: bef@bef.fo

1. oktobur seinasta freist at skráseta prutlið!

KOYRIÐ LOGLIGA VIÐ GRØNUM




## FILMSTEIGURIN

# Basic

Onkuntíð verður sagt, at sannleikin hevur nógv andlit, og soleiðis er í hesum spennandi filmi.

Eitt lið av servandum amerikanskum hermonnum verður undir løgnum umstøðum burtur í junglini í Panama. Liðið, sum verður leitt av sergent Nathan West, hevur venjing har.

Bara tveir av hermonnunum kom afturíaftur, men báðir nokta fyri at siga, hvat hendi í jungluni.

FBI-agenturin Tom Hardy, sum sjálvur hevur verið hermaður, verður settur at kanna løgna málið, og tað skal hann gera saman við Juliu Osborne, sum er leiðari í hernaðarløgregluni.

Tey bæði koma á tal við teir báðar hermenninar, men teir siga ikki somu søgu. Eitt stendur tó púra greitt: Nathan West og hinir hermenninir mugu hava latið lív undir venjingini. Men hvat hendi teimum, er stóri spurningurin, og hvønn leiklut hevur Tom Hardy havt í hendingini.

So hvørt sum kanningarnar koma longur ávegis er einki, sum tað av fyrstan tíð tóktist at vera.

Tað eru kendir sjónleikarar, sum spæla í hesum undirhaldandi spenningsfilmi. John Travalta hevur leiklutin sum Tom Hardy, og hann skal samstarva við donsku sjónleikarkvinnuna Connie Nielsen, sum nú er kent og virt navn í amerikansku filmsvinnuni. Samuel L. Jackson spælir heryvirmaðurin Nathan West.

John McTiernan hevur leikstjórnað filmin, og hann átti at vita, hvussu ein spennandi filmur skal setast saman. Hann hevur nevniliga áður gjørt filmar sum Die Hard, The Hunt For Red October og Predator.

Hann sigur, at ein týðandi orsøk til, at hann valdi at gera hendan filmin var, at John Travolta skuldi spæla leiklutin sum Tom Hardy.

– Hesin leikluturin er sum gjørdur til John Travolta, og í hesum filmi sleppur Travolta at spæla júst soleiðis, sum fólk elska at síggja hann, sigur leikstjórin.








**Frumsýning**
Fríggjadagin 19.09. kl. 23³⁰ Leygardagin 20.09. kl. 23³⁰
Sunnudagin 21.09. kl. 22⁴⁵

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Fríggjadagin 19.09. kl. 20³⁰ Fríggjadagin 19.09. kl. 22⁴⁵
Leygardagin 20.09. kl. 20³⁰ Leygardagin 20.09. kl. 22⁴⁵
Sunnudagin 21.09. kl. 19⁴⁵ Sunnudagin 21.09. kl. 22³⁰



Fríggjadagin 19.09. kl. 18⁰⁰ Leygardagin 20.09. kl. 18⁰⁰
Sunnudagin 21.09. kl. 18¹⁵



**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 19.09. kl. 16⁴⁵ Leygardagin 20.09. kl. 16⁴⁵
Sunnudagin 21.09. kl. 16⁰⁰



**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 19.09. kl. 18³⁰ Leygardagin 20.09. kl. 18³⁰
Sunnudagin 21.09. kl. 17⁴⁵



Fríggjadagin 19.09. kl. 20⁰⁰ Leygardagin 20.09. kl. 20⁰⁰
Sunnudagin 21.09. kl. 20¹⁵